## Tætt samstarv við sjómenn

Í novembur í 2006 slapp Rúna Hjelm, granskari, at mynstra við Skálabergi og tað tók hon sum eitt gylt høvi til at koma tætt at lívinum hjá sjómonnum umborð á einum av okkara mest framkomnu trolarum. Hóskvøldið 15. november klokkan 19.30 heldur Rúna Hjelm fyrilestur í bókasavninum í Klaksvík við heitinum "Við Skálaberg í Barentshavinum – upplivingar og gransking". Í fyrilestrinum fer hon at lýsa tilknýti hjá føroysku fiskivinnuni til fiskivinnusamfelagi. Ein partur av tí føroysku innuløgumentanini er at gramsa og tann síðurin verður lýstur sum eitt dømi um samanrenningina millum sjógv og land.



## Kunning um Føroyar

Landsbankin hevur nú gjørt sína árligu frágreiðing um føroysk samfelagsviðurskifti. Frágreiðingin, ið er á enskum, greiðir frá um føroyska búskapin, føroyska vinnulívið, almenna geiran, fíggjarmarknaðin, arbeiðsmarknaðarviðurskifti og samfelagsbúskaparlig viðurskifti sum heild, sigur Landsbankin í tíðindaskrivi. Eisini lýsir frágreiðingin Føroyar í stuttum, eitt nú tá ið umræður landafrøðiligu støðuna, fólkatal, altjóða samstarv og politisku skipanina. Meiri fæst at vita um frágreiðingina á heimasíðuni hjá Landsbankanum: www.landsbankin.fo

# Vágbingur uppfunnið kollveltandi tøkni



**Vágbingurin, Kaj Joensen, ið hevur siglt sum maskinstjóri í mong ár, hevur uppfunnið eina skipan, sum reinsar kjalavatnið umborð á skipum og bátum fyri olju. Mett verður, at nýggja uppfinningin kann gerast ein sonn kollvelting innan umhvørvisvernd, heilsu og trygd á sjónum, samstundis sum uppfinningin fer at styrkja ímyndina av reinleika í føroysku náttúruni**

UPPFINNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein av mest dálkandi og eitrandi keldunum á havinum er olja, sum verður pumpað í havið úr kjølinum á skipum.

Flestu skip og bátar, sum hava motor, missa nakað av olju niður í kjølin. Orsøkin kann vera, at motorurin lekur olju, men olja kann eisini fara í kjølin í sambandi við ymiskar umvælingar. Jú eldri motorurin er, tess meira olja lekur vanliga úr honum.

Tól fáast til keyps, sum kunnu skilja olju frá vatni, og slík eru eisini at finna umborð á flestu skipum. Men av ymiskum orsøkum eru hesi tól ikki nøktandi, og hetta er eitt stórt umhvørvisligt og heilsuligt vandamál.

Altjóða sjóvinnufelagsskapurin IMO ásetti í 1974, at ávísar skipastøddir og skipasløg skuldu hava tilíkar oljuskiljiskipanir, og ásett varð eisini, at serlig loggbók skal førast fyri skiljing og burturbeining av fráskildu oljuni.

Í byrjanini var eitt hámark sett fyri, hvussu reint lensivatnið skuldi vera, og í 1992 var hámarkið økt.

Í fyrsta umfari var talan um tað, sum rópt verður 100 partar av olju-/dálkaðum tilfari fyri hvørja miljón – og í øðrum umfari 15 partar av olju-/dálkaðum tilfari fyri hvørja miljón.

Yvirhøvur er tað soleiðis, at tær oljuskiljiskipanir, sum verða nýttar umborð á skipum í dag, ikki megna at røkka hesum máli.

### Føroysk uppfinning

Nú hevur so vágbingurin, Kaj Joensen, ið er útbúgvin maskinist og sjálvur hevur siglt sum maskinmeistari og maskinstjóri í eini 25 ár, gjørt eina prototypu av eini oljuskiljiskipan, sum við smærri tillagingum kann koma at seta uppfinnaran og Føroyar á heimskortið innan menning av umhvørvistøkni.

Skipanin, sum Kaj hevur ment, hevur nógvar og góðar eginleikar, sum verandi skipanir ikki hava.

Sjálvur sigur Kaj við Sosialin, at hann í fleiri ár sum maskinstjóri hevur gingið og hugsað um, hvussu olja, sum endar í kjalavatninum, betur kann skiljast frá vatninum, áðrenn lensað verður.

– Eg havi siglt sum maskinmeistari og maskinstjóri í nógv ár, og hesin tanki hevur javnan vent aftur í mær seinastu 20 árini.

Hann sigur, at tað var í mai/ juni mánaða í fjør, at hann av álvara fór at hugsa um, hvussu hann kundi viðvirka til, at ein betri loysn kemur á hesum øki.

– Eg gavst at sigla í fjør heyst, men havi verið onkran túrin síðan. Havi tó ikki verið bundin at nøkrum skipi, nú eg havi arbeitt við hesi skipan.

Kaj sigur, at hann rættiliga hevur hingið í og hevur roynt at vunnið undir land seinastu 2-3 mánaðirnar.

– Í dag stendur skipanin, sum byggir á samanseting av ymiskum kendum komponentum, í bilhúsinum hjá



*Oljuskiljiskipanin hjá Kaj Joensen verður ikki serliga kostnaðarmikil. Hon er einføld, løtt at viðlíkahalda, og tað besta er, at hon er sera effektiv. Skipanin kann lagast til bæði stór og smá skip. Ein av størstu umhvørvisvandunum á havinum er oljudálkað lensivatn frá skipum*

*Myndin er tilvildarliga vald*